# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo



Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo



Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo



Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo



Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

## Tranmere spældi javnt

Gunnar Nielsen vardi málið, tá Tranmere og Mansfield spældu javnt í venjingardysti. Tranmere Rovers og Gunnar Nielsen fyrireika seg til komandi kappingarár í triðbestu ensku deildini. Í dag spældi liðið venjingardyst móti Mansfield. Úrslitið varð 1-1. Gunnar Nielsen vardi málið í samfullar 90 minuttir.



# Sigrarnir siga sína

**KAPPRÓÐUR**

**Røðin av vinnarum á Ólavsøku minnir aftur á tíðarskeið, tá ið ymiskir bátar og bygdir og býir hava staðið seg serliga væl í kappróðrinum**



Tróndur Arge

Mikudagin verður síðsta punktumið sett fyri kappróðrarárið 2010. 900 metra teinurin frá Argjahøvda og fram við Molanum og inn á málið millum Tinganes og innasta partin av Molanum verður rógvið og spurtað fyri síðstu ferð, og so verður hetta árið partur av kappróðrarsøguni, sum livir og andar kring landið alt og í øllum ættarliðum.

Higartil í ár hava vinnararnir verið væl býttir kring alt landið, og FM steyp og krónur fara harvið kring alt landið.

Í blaðnum í dag hava vit vinnararnar í ólavsøkuróðrunum aftur til 1975. Fyri 35 árum síðani var tað fyrsta ferðin, at tíð varð tikin í kappróðrunum á Ólavsøku. Tað hevur fleiri ferðir verið nevnt, at tað skal ikki gangast so høgt upp í tíðirnar, tí tað eru so mangar um støður, ið kunnu ávirka, og at tað harvið illa ber til at sammeta tíðirnar eitt ár við eitt annað ár.

Sjálvandi er tað soleiðis, men vit hava kortini dittað okkum at seta listan yvir vinnaratíðirnar á Ólavsøku soleiðis, sum hann sæst á heimasíðuni hjá Havnar Róðrarfelag, drekin.fo.




*Róðrarteinurin á Ólavsøku*

Hóast ivi kann vera um, hvussu neyvar tíðirnar altíð hava verið, so er tað einki at liggja omaná, at tað millum rógvararnar verður gingið høgt upp í tølini og metini. Eitt nú ætlaðu klaksvíkingar í fjør at taka metið í kappingini millum 10-mannaførini, sum Skálabáturin hevur átt síðani í 1992. Tað eydnaðist ikki. Klaksvíkingur var meiri enn fýra sekund frá átjan ára gamla metinum hjá skálamonnum.

Líkindini at rógva á Ólavsøku í fjør vóru ikki at teim bestu, og millum rógvarar kann nógv tíð fáast at ganga við at umrøða, um nú Skálabáturin var so nógv betri fyri átjan árum síðani, enn Klaksvíkingur var tað í fjør, ella um kanska klaksvíkingar høvdu rokkið setninginum, um tað ikki hevði verið so djálvut frá Argjahøvda og inn á Molan!

Í 2001 var tað rættuliga tætt við, at tað eydnaðist Havnarbátinum at taka metið hjá Skálabátinum. Tað gekk akkurát ikki. Tíðin hjá Havnarbátinum var 3.52.03. Mettíðin hjá Skálabátinum er 3.52.00!

### Tindarnir

Vinnaralistin minnir eisini á, nær ymsu økini og bygdirnar hava verið á toppinum.

Sum tað sæst, so hevur Havnar Róðrarfelag sum oftast átt ein og fleiri vinnarar. Tað er møguleiki fyri, at tað eisini í ár fer at hilnast væl hjá vertunum á Ólavsøku, men úrslitini higartil í ár hava ikki bent á, at tað fer at eydnast í øðrum kappingum enn á 250 metra málinum í barnaróðrinum.

Í kappingini millum 10-mannaførini eru tað Eysturoyingur og